**Útboð – Keyp av persónbili til Barnaverndarstovnar**

**Almannaverkið tørvar ein nýggjan persónbil í "Golf klassanum".**

Almannaverkið hevur fingið undantak til at keypa bensinbil í staðin fyri el-bil. Tí fevnir hetta útboðið einans um bensindrivnan persónbil.

**Treytirnar eru fylgjandi**

- Bilurin skal kunna flyta 4–5 vaksin á tryggan og góðan hátt.
- Bilurin skal nýtast til koyring millum bygdir í øllum veðri, og tí skal hann vera væl egnaður til føroysku koyrilíkindini. Dentur verður lagdur á motorkraft, koyrieginleikar og trygd.
- Bilurin skal vera bensindrivin.
- Bilurin skal hava automatisk gear.
- Støddin á bilinum skal vera í "Golf klassanum" ella samsvarandi.
- Bilurin skal hava minst 4 hurðar.
- Bilurin skal hava bakkikamera og parkeringssensorar.
- Bilurin skal verða veitast til Almannaverkinum í 2026, helst skjótast gjørligt. Veitari skal upplýsa væntaða veitingartíð.
- Bilurin skal hava ein neutralan lit, sum t.d. koks- ella myrkagrátt. Svart ella hvítt kann eisini bjóðast, men kann verða mett lægri.
- Almannaverkið krevur, at veitarin skal hava góðkent verkstað tá tørvur er á eftirliti og umvæling.

**Tilboðið skal innihalda**

- Lýsing av bilinum.
- Tekniskt dátublað.
- Tilboðsgevari skal upplýsa fylgjandi:
    - Samlaðan prís uttan MVG.
    - Samlaðan prís við MVG.

    - Samlaðan prís við virðisgjald og MVG.
- Upplýsingar um garanti.
- Upplýsingar um serviceintervall.
- Væntaða veitingartíð.

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Um Almannaverkið í sambandi við hesa útbjóðing fær tørv á fleiri bilum av sama slag, tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar frá vinnandi veitara, uttan at nýtt útboð verður gjørt.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat tilboð – um nakað – verður tikið av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á niðanfyri nevndu viðurskiftum.

Almannaverkið ynskir at kunna royna bilin, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bilin, sum gevur besta lutfallið millum prís og góðsku. Tó kann Almannaverkið velja ein dýrari bil, um mett verður, at hesin gevur eina betri loysn í mun til endamál, góðsku og rakstur.

**Tilboðini verða vektað soleiðis**

- Prísur – 60 %
- Egnaður til endamál – 20 %
- Góðska – 20 %

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um útboðið og tilboðsgrundarlagið. Spurningar skulu, so vítt gjørligt, verða settir skrivliga.

Spurningar skulu sendast til **rogi@av.fo**. Spurningar og svar verða kunngjørd á Keypsportalinum sum partur av útboðstilfarinum.

Tilboð skulu latast inn um til Almannaverkið í seinasta lagið mikudagin 23. September 2026 kl. 12:00.

Tilboðið skal sendast við telduposti til rogi@av.fo